# Claus aftur á liðnum

Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var aftur á liðnum hjá Blackpool, tá liðið spældi fyrsta dystin í nýggja kappingarárinum um vikuskiftið. Blackpool spælir í næstbestu ensku deildini. Fyrsti dysturin var á útivølli ímóti Norwich, og Blackpool fekk javnleik. Claus og teir løgdu seg á oda við brotssparki 10 minuttir eftir steðgin, men stívliga eitt korter fyri leiklok javnaði Norwich. Claus Bech Jørgensen spældi við allan dystin.



# Neville nýggjan sáttmála

33 ára gamli Gary Neville fær eftir øllum at døma nýggjan sáttmála í Manchester United. Farna kappingarár var Neville, sum hevur verið liðformaður í United, skaddur alla tíðina, men venjarin Sir Alex Ferguson vil hava Neville í felagnum. - Hann er ein fínur fýrur, sum vit vilja hava við í okkara hópi. Tí fær hann ein nýggjan sáttmála, sigur Ferguson, sum tó ikki kann lova Gary Neville fast pláss á liðnum.






Skála-NSÍ 1-1 )1-0):

# Meistararnir hava mist flogið

*Skála*

*NSÍ*

**Javnleikurin ímóti botnliðnum ber við sær, at NSÍ er fokið og ongan møguleika hevur at endurvinna FM heitið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*Joannes@sosialurin.fo*

NSÍ verður ikki meistari. Støðutalvan hevur leingi boðað frá hesum veruleikanum, og í gjár varð staðfest í kommunuuppgerðini á Skála, at heimaliðið, sum framvegis er á aftasta plássi, er eins væl og kanska betri fyri, enn NSÍ er tað. Hesum var tað sjón fyri søgn fyri í grannauppgerð, har spælið ikki var serliga væl skipað, og har tað – eisini orsaka av fríska lotinum – vóru nógvar sendingar, sum ikki vignaðust, sum tað var ætlað.

Úrslitið var 1-1. Tað iðrateir á Skála seg mest yvir, hóast teirra avrik heldur ikki var so ógvuliga sannførandi. Fyritreytirnar hjá skálamonnum gjørdust einki serligar. Tveir av stuðulsspælarunum noyddust longu í 1. hálvleiki at taka seg av vøllinum, tí teir vóru skaðadarvaðir.

Ikki meiri enn stórur hálvur tími var farin, tá ið fyrst ágrýtni álopsspælarin Bogi Gregersen, sum varð skaðaplágaður beinanvegin, og síðani miðvallar stýrimaðurin Pauli G. Hansen noyddust av vøllinum. Serliga meint var tað, at Pauli noyddist av vøllinum. Tá varð Pætur Dam Jacobsen fluttur á sentralt miðvallarpláss, meðan Bárður Joensen varð settur inn á vongverjan í høgru.

NSÍ hevði fitta lotið undan í 1. hálvleiki, men tað var heimaliðið, sum legði seg á odda, tá ið tíggju minuttir vóru farnir. Jónhard Frederiksberg, sum hevur bæði longri tjóður og størri sjálvsálit, nú hann er aftur í barndómsfelagnum, enn hann hevði í NSÍ, sneiddi seg eftir innkast í vinstru til baklinjuna og legði út frá. Alexandur Johansen royndi ímóti málinum, og eftir kontra var tað nýggi miðvallarin Sjúrður Djurhuus, sum sendi bóltin í málið aftanfyri Tórð Thomsen.

Burtursæð frá løtuni, eftir at Skála hevði lagt seg á odda, var Skála væl grammari í 1. hálvleiki, og heimamenninir vunnu nærdystirnar og vóru fyrri á næstu bóltunum. Men tað eydnaðist teimum ikki at økja um leiðsluna og harvið at leggja seg á tryggari sigurskós.

Arnhold Berg var sannur brandur í miðverjuni, og Erland B. Danielsen og Sjúrður Djurhuus stóðu seg væl á miðvøllinum.

Eftir steðgin royndi Skála við langskotum undan vindinum, men tað eydnaðist ikki at skjóta fleiri mál. Næst við var miðverjin, Poul N. Poulsen, tá ið 2. hálvleikur var um at vera hálvrunnin, men bólturin brast í tvørtræið aftanfyri NSÍ málverjan.

## Glansurin er burtur

Fyri einum ári síðani gekk tað sum eftir ánni hjá NSÍ. Á veg móti meistaraliðnum koppaðu tøttu og intensu uppgerðirnar teimum gulu til fyrimunar, og tað var rárasta hending, at liðið ikki hevði somu manning.

Nú er tað ikki soleiðis. At Óli Hansen aftur var leikbannaður bar við sær, at Aco Pandurovic var í miðverjuni saman við Jóhan Troest Davidsen. Jónas Þór Næs, sum var vongverji í høgru, tóktist skaðadarvaður, og í hinum borðinum gjørdist tað ofta vandamikið, tá ið teir mistu í uppspælinum.

Nýggi landsliðsspælarin, Bogi Løkin, sum man vera ein tann støðugasti á meistaraliðnum í ár, skoraði útjavnandi málið, tá ið 2. hálvleikur bara var eina løtu gamal. Eftir hornasparksinnlegg úr høgru frá Sjúrði Jacobsen stýrdi hann stutt úr málinum bóltin inn um Predrag Markovic, sum hevði onkrar góðar bjargingar í Skála málinum. Eitt nú tá ið hann seint í 1. hálvleiki varði fyri, eftir at Hjalgrím Elttør hevði lagt frísparksinnlegg í brotsteigin og Aco Pandurovic hevði stýrt bóltin ímóti málinum.

Men ov ofta var tað ikki nóg polerað og við tí tyngd, broddi og styrki, sum í fjør bar við sær, at NSÍ ofta avgjørdi fram ímóti dystarenda. Nógv av álopsspælinum er lagt til rættist fyri at Karoly Potemkin, sum var einsamallur á toppinum, meðan Hjalgrím Elttør var eitt sindur aftari, skal avgera. Teir báðir fremstu hava sæð betri dagar, enn tað teir vístu á Skála, og tá ið sentrali miðvøllurin heldur ikki var so væl fyri, sum hann áður hevur verið, so var tað ikki óvæntað, at tað ikki eydnaðist at fáa fulla úrtøku og harvið at halda tørn um silvurplássið, sum hesa ferð varð útskift við fimta plássið.

Glottin hjá NSÍ kundi vera, at tað í triðju royndini eftir summarsteðgin endiliga eydnaðist at fáa stig burturúr. Men úrtøkan var ikki tann,sum NSÍ hevði vónað at vunnið ímóti botnliðnum, ið kortini ikki spælir sum upplagdur niðurflytari.